**Missiónshúsið Tabor, Toftir.**
Familjumøti verður sunnudagin kl 17. Sigrun og Leo Hans Mikkelsen tala og ung hava ein bíbilleik. Ungar gentur syngja. Øll eru vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
byrjar aftur mánakvøldið 22. sept. í húsinum hjá Kvinnufelagnum. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 19 Samkomulegan byrjar.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Hjørdis H. Petersen.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin kl. 6 Bøn, kl. 20 Bibiltími - Áps. 8, 26-40 Hirðmaðurin úr Etiopia v/Boga Olsen.
Hósdagon kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagin kl. 21 Ungdómsmøti v/Bergur Debes Joensen.
Sunnudagin kl. 17 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti - Jónhilda og Gulak Hansen luttaka við talu og sangi.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið Tabor, Toftir**
Sunnudagin 21. sept. kl 17. verður familjumøti við Sigrun og Leo Hans Mikkelsen.
Øll eru vælkomin!
Vegna familjumøti verður eingin sunnudagsskúli.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Robert McLuckie talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 19 Juniorringur.
Sunnudagin kl. 18 møti v/ Regin Høgnesen.

**Samkoman í Hebron, Leirvík**
Mikukvøldið kl. 19.30 - læra, bøn og samfelag - Marion Jensen greiðir frá.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl.18 evangeliskt møti.

**KFUM & Klaksvík**
Mikudagin 17. kl. 20 Bíbliutími við Leivur í Buð Josvabók kap. 3.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Mikudagin kl. 20 bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti. Dánjal Petersen talar.
Leygardagin kl. 10 morgunbøn.
Sunnudagin kl. 11 møti. André Matras talar.
Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 ungdóms Alpha.
Sunnukvøldið kl. 18 møti og sunnudagsskúli.

**Betania, Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 Bíbliutími v/ Dánial á Dul Jacobsen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími. Matt. 3. kap.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn- & lovsangur. Kl. 18 møti.
Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Sunnudagin Møti kl. 18 Símun Jacobsen.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hósdagin kl. 20 streingjakórið.

**Suðuroy**
Sjómanskvinnuringarnir í Suðuroy samlast í missiónshúsinum í Porkeri leygardagin 20. sept. kl. 18. Sjómanstrúboðarnir verða við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Á møtinum sunnudagin kl. 18. talar Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari. Øll eru vælkomin!

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491*
*Fax 316481 · Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
***Hósdagin 18. sept.:***
kl. 10.00 - Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
10.30 - Lesibólkurin hittist aftur 25.sep
Bókin: "Drageløberen, Khalid, Hossin, verður lisin
14.00 Boccia í kjallaranum
Fríggjadagin 19. sept.:
kl.10 - 17 Opið hús
*Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn mikuog fríggjadag frá kl. 10-13.30. Tørvurin á vitaminum og mineralum minkar ikki við árunum, tí er tað týdningarmikið at eta góðan mat.*
***Skeið í matgerð.***
*Eitt hold mikudag kl. 10.00 - 13.30*
*Og eitt hold fríggjadag kl. 10.00 - 13.00*
*Lærari: Anne Grethe*
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi Glyvrar**
Tlf. 448279
Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00.
Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.
***Hósdagur 18. sept.***
Felagssangur
***Fríggjadagur 19. sept.***
Opið hús.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
Opið er mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17. Í september er høvi at gera sítt persónliga krúss - ella annað úr leiri. Eisini samla vit uppskriftir um at taka slakt upp. Øll eru vælkomin við sínum íkasti.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit hava opið týsdag, mikudag og hósdag kl. 15-18 í Luffustovu.

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Dagtilhaldið Vesturskin Toftir**
Opið týsdag, mikudag og hósdag frá kl 15-18. Øll eldri eru vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofiu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

**Sunda Pensionistafelag**
EINKI hugnakvøld verður í septembur, kunngjørt verður í bløðunum, nær næsta hugnakvøld verður

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Sandoyar Kunningarstova**
Mørkin Mikla 3kj
FO - 210 Sandur
Tel. 361836, fax 361256
www.visitsandoy.fo
sandinfo@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mánadag - fríggjadag kl. 13 - 16.

**Listasavnið á Sandi nú opið gerandisdagar**
Við tað at summarið er í nánd, so er Listasavnið nú opið aftur týsdag - sunnudag kl. 14-16. Tó er tað stongt mánadag. Listasavnið á Sandi er sanniliga vert eina vitjan.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Stoffskiftisfelagið**
*Millum Gilja 111*
*Hoyvík*
Les meira á www.stoffskifti.com

**Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum**
hevur hesi telefon nr.:
form. 313484 - 219584
næstform. 421092 - 281179
nevndarl. 319588 - 212839.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Djóraverndarfelagið, tlf. 504533**
*postsmoga 1365, Tórshavn.*
dvf@dvf.fo

**HUFF, Hundaeigarafelag Føroya**
*limur í Dansk Kennelklub, kreds 12.*
Telefonin hjá felagnum er: 277317. Til ber at tekna seg sum lim og spyrja um eitthvørt viðv. hundum.
Hvørt týskvøld kl. 19.00 ganga vit túr, møtast við Skógrøkt Landsins.

**Giktafelag Føroya**
**MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13.00 til 16.00.

**Cøliakifelag Føroya**
Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783.
Hjartafelagið
Postboks 3120,
110 Tórshavn, e-mail: hjartafelag@hjartafelag.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Súnfríð 316167, Ella 316261, Daisy 312498, Paulina 510677, Henry 272800.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Frítíðarfelagið »Antares«**
*Postsmoga 11, 490 Strendur*
Frítíðarfelag hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum ið starvast í altjóða farma- og frálandavinnu.
Meira fæst at vita við at venda sær til Felagið á tlf. 590100, ella um teldupost aldebaran@kallnet.fo

**Konfirmantar í Fuglafjarðar kirkju 21. september:**
*Úr Fuglafirði:*
Jákup Jákupsson Eliassen, Leitisvegur 30,
Hjørtur á Fløtti, Sevdalsvegur 13,
Margeir Toftegaard, Kirkjuvegur 3,
Sigmundur Vang, Vestur í Bø 7,
Sunniva Fríða Berg, Norður í Gerði 19 ***(frá kl.17.00 verður dagurin hildin í Mentanarhúsinum)***,
Elin Johansdóttir Larsen, Toftagøta 12,
Durita Kallsoy Róin, Sevdalsvegur 3.

*Úr Leirvík:*
Renata Jensen, Áargarður 4.

**50 og 55 ár**
Leygardagin 11. oktober kl. 19.00 halda Hervør og Dánial Jákup Jørgensen úr Miðvági 50 og 55 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági. Tey, ið vilja gleða okkum okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 27. september á telefon 33 32 04 og 22 96 04 ella á telduposti: herdan@post.olivant.fo

**80 ár**
Mikudagin 17. september fyllir Sámal Kristiansen, Fuglafjørður, 80 ár. Sámal er burturstaddur føðingardagin.

Týsdagin 23. september fyllir Jóan Pauli Johannesen, vanliga nevndur Palli í Jákupsstovu, Vestmanna, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin ið Miðhøllini í Vestmanna skúla sunnudagin 21. september frá kl. 16-20.

**75 ár**
Fríggjadagin 19. sept. fyllir Hans Andreas Lamhauge, snikkari, Glyvrar 75 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**90 ár**
Mikudagin 17. september verður Hansina Lind Høgnesen, Leirvík, 90 ár. Dagin heldur hon á Giljagarði saman við familju.

Týsdagin 23. september fyllir Anna Jacobsen, Hoyvíksvegur 31, Tórshavn 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. sept frá kl. 10-16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 20. september kunu hjúnini Rigmor og Moody Olsson halda gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru hjartaliga vælkomin millum kl. 9 og 18 á Heygsmannavegi 2 í Tórshavn.